FÓTBÓLTUR

ÍTRÓTTUR

B68 KIKSAÐI ÍMÓTI KÍ

Mest óvæntaða úrslitið í 16. umfari í næstbestu fótbóltsdeildini var, at B68 á heimavølli ikki megnaði at vinna úrtøku ímóti teimum næstbestu hjá KÍ. Tá ið bæði Skála og FC Suðuroy samstundis vunnu rudduligar heimasigrar, bar tað við sær, at munurin tódnaði millum liðini, sum kappast um at flyta upp

Jóannes Hansen



Hjá toppliðnum HB var søgan tann sama, sum hon hevur verið tað mesta av árinum. HB vann 2-0 í Trongisvági. Í síðsta minuttinum undan steðginum setti Páll Holm Jacobsen hol á, og miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti Jákup Slættalíð HB sigurin, ið ber við sær, at tað nú eru sjey stig frá HB og aftur til B68.

Toftamenn høvdu vitjan av teimum næstbestu hjá KÍ, og fyrstu løtuna gekk tað soleiðis, sum tey flestu ivaleyst mundu rokna við, at tað fór at gera. Hákup Edmundsson og Jóhannus Hansen løgdu B68 framum 2-0, men so svaraði KÍ aftur. Eli Simonsen, sum áður hevur spælt við B68, minkaði um munin miðskeiðis í 1. hálvleiki, og miðskeiðis í 2. hálvleiki svaraði KÍ orduliga aftur: unglingaspælararnir Tórur Justesen og Jákup Pauli Ziskason vendu 2-1 til 2-3, og Henry Heinesen økti um munin til 4-2, áðrenn B68 liðformaðurin Jóhan Dávur Højgaard fram ímóti dystarenda minkaði um munin, so úrslitið varð 3-4.

Á Fjarðastevnu hevði Skála vitjan av B71. Stevnuhýrurin varð ikki verri av, at heimaliðið vann 3-0. Eftir eitt korter setti Karstin Justesen hol á, og tíðliga í 2. hálvleiki økti Edvin Jacobsen um munin, áðrenn Karstin Justesen staðfesti 3-0 sigurin, sum ber við sær, at Skála nú er á fimta plássi og trý stig frá týdningarmikla bronsuplássinum.

FC Suðuroy bjóðar framvegis av. Hesa ferð gekk tað striltið í 1. hálvleiki, tá ið tað bara var Salmundur Bech, sum skoraði ímóti EB/Streymi, ið er hótt av niðurflyting. Tepra leiðslan helt sær, inntil tað var minni enn ein hálvur tími eftir, men so gekk skjótt: Jón Krosslá Poulsen og eitt sjálvmál bendu á heimasigur, og fram ímóti dystarenda staðfestu Teitur Tausen og Salmundur Bech rimmar 5-0 heimasigurin á Vágseiði.

Ungu menninir í B36 vóru sera sannførandi, tá ið Víkingur vitjaði í Gundadali. 5-0 sigurin ber við sær, at árstalsfelagið heldur væl og virðiliga tørn um bronsuplássið. Aftur hesa ferð skoraði Tóki á Lofti hattrikk. Tað ber við sær, at hann higartil hevur skorað tólv mál í landskappingini, og at Tóki á Lofti nú er toppskjútti í 1. deild. Hini B36 málini skoraðu Rasmus Dan Sørensen, sum frammanundan hevði spælt í eina lítla løtu á besta liðnum, sum vann 3-1 á NSÍ, og hjálparvenjarin og veteranurin Milan Kuljic. Einasta Víkinga málið skoraði Gunnar Vatnhamar, tá ið hann minkaði um munin til 3-1

joannes@sosialurin.fo

BÍÐA EFTIR 11. SEPTEMBER

Seinastu dagarnar hava fleiri dystir verið í bestu kvinnudeildini. Mikukvøldið 19. juni vóru tveir dystir, sum sambært skránni áttu at verið 6. juli, og í vikuskiftinum vóru tríggir dystir. Burtursæð frá ÍF-HB, sum er á skránni 6. juli, so verður nú summarfrí fram til sunnudagin 18. august.

Í toppinum er støðan óbroytt. EBS/Skála er eftir ellivu umfør á odda við 30 stigum, og KÍ hevur 28 stig. Tað eru bara hesi bæði liðini, sum kappast um FM heitið. Burtursæð frá at KÍ herfyri ikki megnaði meiri enn javnleik í Gundadali ímóti B36, so hava úrslitini lagað seg soleiðis, sum tað kundi roknast við. KÍ vann mikukvøldið trilvaligan sigur á AB á útivølli, og EBS/Skála hevur vunnið á B36 á heimavølli og Víkingi á útivølli, uttan at nakað mál er farið ígjøgnum hjá oddaliðnum.

Um tað næstu nógvu ferðirnar fer at laga seg soleiðis, sum tað higartil hevur gjørt, so er tað sannlíkt, at FM finalan verður í Klaksvík mikudagin 11. september, tá ið EBS/Skála og KÍ bresta saman í Klaksvík.

HB og B36 eru í tættari kapping um bronsuplássið, ÍF hevur næstan tryggjað sær fimta plássið, Víkingur er nummar seks, og AB eigur framvegis fyrsta sigurin til góða.

1. Deild *menn*

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	HB II	16	11	3	2	42	19	+23	36
2	B68	16	8	5	3	37	20	+17	29
3	B36 II	16	8	3	5	40	25	+15	27
4	KÍ II	16	8	2	6	33	26	+7	26
5	Skála	16	7	3	6	36	26	+10	24
6	FC Suðuroy	16	7	2	7	33	33	0	23
7	Víkingur II	16	7	1	8	29	29	0	2
8	B71	16	4	2	10	14	46	-32	14
9	EB/Streymur II	16	3	4	9	19	35	-16	13
10	TB II	16	4	1	11	17	41	-24	13

1. Deild *kvinnur*

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	EBS/Skála	11	10	0	1	44	7	+37	30
2	KÍ	11	9	1	1	54	8	+46	28
3	HB	10	6	1	3	35	11	+24	19
4	B36	11	5	2	4	14	18	-4	17
5	ÍF	10	4	0	6	14	37	-23	12
6	Víkingur	11	1	1	9	3	47	-44	4
7	AB	12	0	1	11	3	39	-36	1
8	B68/NSÍ	0	0	0	0	0	0	0	0